LM-053/2025

FÆRØERNES
POLITI

POLITI

Løgmálaráðið

lmr@lmr.fo

Dato: 04-11-2025
J. nr.: 2025-290629
Dok.nr.: 4306463
Sagsbehandler: Katrin Thorsvig Hansen

FÆRØERNES POLITI
Ledelsessekretariat

Húsagøta 3
100 Tórshavn

Tlf.: 114 eller (+298) 35 14 48
E-mail: politi@politi.fo
CVR nr.: 17143611

Viðv. løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli

Føroya Politi hevur fingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli til ummælis.

Føroya Politi hevur fleiri ferðir víst á, at upptøkur frá vakmyndatólum kunnu vera eitt týdningarmikið amboð í arbeiðnum hjá politinum. Yvirskipað tekur Føroya Politi tí undir við uppskotinum, sum hevur eina skynsama javnvág ímillum at økja um tryggleikan á útsettum støðum og rættindini hjá tí einstaka.

Føroya Politi tekur undir við landsstýrinum í, at vakmyndatól eru eitt amboð millum fleiri, sum skulu brúkast fyri at økja um tryggleikan í almenna rúminum. Føroya Politi tekur eisini undir við landsstýrinum í, at tað er týdningarmikið, at tað eisini verður arbeitt verður við at basa teimum trupulleikum, sum kunnu vera orsøkin til ótryggleikan. Hetta krevur eitt tvørgeiraligt samstarv og átøk, sum Føroya Politi fegin luttekur í saman við øðrum viðkomandi myndugleikum, undir hesum kommunum, Almannaverkinum, heilsuverkinum, serliga psykiatriskum serfrøðingum osfr.

Føroya Politi hevur harumframt hesar ítøkiligu viðmerkingar til uppskotið:

Á s. 6 undir pkt. 1.4. framgongur, at um illgruni er um lógarbrot, kann politiið fáa atgongd til upptøkur við rættarúrskurði sambært ásetingunum í rættargangslógini. Hetta er ikki í samsvari við § 6a, stk. 3 og serligu viðmerkingarnar til ásetingina. Um víðarigeving av upptøkunum krevur rættarúrskurð eigur hetta at framganga í lógartekstinum.

Tað framgongur av § 6, stk. 3, at tað einans er politiið, sum kann viðgera persónupplýsingar í samband við upptøkur, sum eru fevndar av stk. 1. Hetta er endurtikið í viðmerkingunum.

Føroya Politi tekur undir við at avmarka, hvør kann viðgera upptøkurnar. Um upptøkurnar skulu innganga í revsimál – sum í útgangsstøðinum er orsøkin til, at politiið biður um upptøkurnar – er tað tó ein fortreyt, at allir myndugleikarnir o.o., sum eru partar av revsimálum, eisini kunnu viðgera upplýsingarnar. Tað eru t.d. ákæruvald, dómstólar, verjar og kærumyndugleikar. § 6a, stk. 3, 2. pkt. kundi tí heldur verða orðað soleiðis:

> *Upptøkur, sbrt. stk. 1, kunnu viðgerast av øðrum enn politinum um hetta er neyðugt í samband við ítøkilig revsimál.*

§ 10 verður broytt soleiðis at revsast kann fyri brot á § 6a, stk. 1, 3 og 4.

Víst verður á útgangsstøðið í § 27, stk. 2 í revsilógini, sum hevur við sær, at almennir myndugleikar ikki kunnu revsast í samband við myndugleikaútinning. Um § 10, stk. 1 í vakmyndatólslógini víkir frá hesum útgangsstøðinum, eigur hetta at vera viðgjørt í uppskotinum.

Um okkurt er ógreitt ella um tørvur er á fleiri upplýsingum, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við Føroya Politi.

Vinarliga

Katrin Thorsvig Hansen
Høvuðsákæri